# Stríðast um jólagávu



Eitt par í Svøríki, sum fann postávísingar fyri 1,1 millión krónur, skal nú stríðast fyri at fáa sína finningarløn. Hetta skrivar Jyllands-Posturin.

Tey bæði fólkini, sum eru miðskeðis í 30'unum, keyptu herfyri eini hús. Fólkini, sum høvdu búð í húsinum frammanundan, vóru farin, og tí vóru húsini sett til sølu.

Stutt eftir keypið funnið fólkini postávísingar fyri 1,1 millión krónur múraðar inni í einum brandskápið. Einki verður sagt um, hví postávísingarnar vóru lagdar so langt til síðis.

Vanliga verða 10 prosent latin í finningarløn, men hetta vil advokturin fyri búgvið ikki lata nýggju eigarunum av húsunum. Málið er nú komið so langt, at tað er endað í rættinum í Lund.

Eitt høvuðsargument hjá advokatinum fyri búgvið er, at parið royndi í ein mánaðiat fáa útgoldið peningin á postávísingunum, áðrenn tey boðaðu frá, hvat tey høvdu funnið.

Advokaturin fyri parið hevur hinvegin ført fram í rættinum, at brandskápið við postávísingunum var partur av húsakeypinum, og tí hevur parið rætt til í minsta lagi 10 prosent í finningarløn.

Rættarmálið verður væntandi avgjørt um tvær vikur, og tá vit tey bæði fólkini, um tey fáa eitt sindur av eyka peningi til at hugna sær fyri á jólum.



















